# 40 ár á Dimmu


*Núverandi og fyrrverandi starvsfelagar hittast aftur – vinstrumegin: Beate og Samuelsen-brøðurnir: Hugo Aage, Flemming og Benny*

**Mikudagin 1. august vóru liðin 40 ár síðani Beate L. Samuelsen byrjaði sum blaðkvinna á Dimmalætting.**

MÓTTØKA
*Snorri Brend*
*Myndir: Jan Müller*

Í hesum sambandi var skipað fyri móttøku í blaðhúsinum, har nógv fólk var á gátt.

Frammanundan hevði blaðið eina samrøðu við Beate, sum herfyri rundaði tey seksti. Her segði hon millum annað at hon hevði trivist sera væl á blaðnum.

Hon helt ikki sum onnur, at betri var at fara av einum arbeiðsplássi, meðan ein fann úthurðina.

- Eg ætli mær at verða borin út av Dimmalætting. Tá ið eg fylti 40, ætlaði eg mær at halda fram, til eg varð hundrað. Nú havi eg sett markið niður á 80 ár, men vit fáa at síggja, um hini til ta tíð vilja hava meg her, segði Beate við blaðið.


*Nógv fólk vóru til móttøkuna. Her heilsar Beate uppá Ellind og Eydnu Egilstrøð*


*Tá ein hevur arbeitt 40 ár á einum blaði, hevur ein samskiftið við mong ymisk fólk. Her eru nakrar teirra*


*Beate varð heiðrað á ymiskan hátt, millum annað við blómutyssum*


*Trý vinfólk hittast. Beata, Jógvan Arge og Jógvan Asbjørn Skaale*